## Hvat heldur tú um háttin, sum sølan av Føroya Banka er farin fram eftir?

EINSKILJING
*Orð og myndir:*
*Pætur Albinus*



**Sjúrður Ravnsfjall, 24 ár**
Eg havi ikki keypt partabrøv, men eg haldi at tað sum er farið fram, er langt úti. Eg fari til skips nú, so ætli mær heldur ikki at keypa í Eik.



**Arna Dam Clementsen, 21 ár**
Eg havi sett pengar í Føroya Banka. Eg síggi vaksandi pening í bankanum. Eri ikki sjálv kundi har, men haldi viðferðin av kundunum er sera vánalig.



**Bjørg Nielsen, 33 ár**
Við mínum partabrøvum vóni eg at fáa vinning. Sjálv eri eg ikki nøgd við framferðarháttin, men hetta kostar mær einki. Hetta átti at fingið avleiðingar fyri bankan, møguliga einskilt hann av nýggjum.



**Gunnar Sørensen, 25 ár**
Tað var meiningin at seta pening í bankan, men eg var ov seinur. Eg haldi, at einskiljingin er gingin láturliga fyri seg, og at teir burdu tikið Eik sum fyrimynd viðvíkjandi søluni. Bankasølan fær ongar avleiðingar fyri viðurskifti míni við bankan, men eg brúki hann nú ikki so nógv frammanundan.

# Eidesgaard vildi lata ókeypis partabrøv

**Áðrenn Jóannes Eidesgaard gjørdist løgmaður og sat í andstøðu, skjeyt hann upp at geva hvørjum føroyingi eitt partabræv á 5.000 krónur í Føroya Banka. – Hetta er eitt rímuligt endurgjald til føroyingar fyri bankabjargingina, segði núverandi løgmaður í 2002**

EINSKILJING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Lítið og onki hevur í seinastuni verið at hoyrt til løgmann í sambandi við einskiljingina av Føroya Banka. Fyri fimm árum síðani, ella góð tvey ár aftaná, at Jóannes Eidesgaard gjørdist løgmaður, hevði hann eina greiða meiningum, hvussu einskiljingin skuldi fara fram. Tá skjeyt formaðurin í Javnaðarflokkinum upp, at allir føroyingar fingu lut í partapeninginum í Føroya Banka.

Í fyrstu atløgu skuldi hvør føroyingur fáa tillutað 1.000 krónur í partapeningi, men yvir fimm ár skuldi hvør føroyingur eiga 5.000 krónur í bankanum.

- Hetta svarar til á leið 50 mió. krónur. Allir føroyingar merkir allir føroyingar uttan mun til aldur, men teir skulu hava fastan bústað her. Annað árið verða so næstu túsund krónurnar til hvønn føroying tillutaðar. Hetta verður gjørt í fimm ár, soleiðis at hvør føroyingur tá eigur partabrøv



*Fyri fimm árum síðani skjeyt Jóannes Eidesgaard upp at lata øllum føroyingum partabrøv í Føroya Banka fyri 5.000 krónur*
*Savnsmynd*

áljóðandi 5.000 krónur. Samlað svarar tað til 250 mió. krónur av partapeninginum í Føroya Banka ella á leið 25 prosent, segði formaðurin í Javnaðarflokkinum. Hetta stóð at lesa í Sosialinum 8. august 2002, har greinin endurgevur tað sum Jóannes Eidesgaard segði undir viðgerðini av løgmannsrøðuni hjá Anfinni Kallsberg, sum var løgmarður í 2002.

Jóannes Eidesgaard helt tá, at tað at geva føroyingum henda møguleika vildi verið eitt rímuligt endurgjald fyri sjálva bankabjargingina, har vanligi skattgjaldarin sat eftir við rokningini. Hetta hevði somuleiðis verið ein lætti til nógvar familjur, sum mistu undir kreppuni ella sótu trongt í tí. Hann kom eisini við einum hugsaðum dømi:

– Ein familju við trimum børnum hevði fingið tillutað 5 x 5.000 krónur ella tilsamans 25.000 krónur. Eftir eina tíð hevði so sama familja kunnað selt hesi partabørvini við vónandi stórum vinningi ella móttikið vinningsbýti hvørt ár. Hetta hevði so eisini givið bankanum møguleika til eina veruliga fólksliga forankring. Men fyrst og fremst ein viðurkenning av teimum tøkum, sum føroyingar tóku undir kreppuni. Javnaðarflokkurin metir uppskotið rímiligt og eitt veruligt sosialpolitiskt frambrot, segði núverandi løgmaður fyri fimm árum síðani.

Undir viðgerðini kom fram, at bæði Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin tóku undir við uppskotinum um endurgjald fyri bankabjargingina.

### Skattalættin bliknar

Jóannes Eidesgaard førdi víðari fram undir viðgerðini av lømannsrøðuni í 2002, at uppskotið hjá honum var ein roynd at formalisera ognarviðurskiftini í Føroya Banka, áðrenn bankin varð privatiseraður.

- Tað fall okkum fyri bróstið, at politikarar vildu selja bankan, sum landskassin – ella rættari sagt – sum fólkið bjargaði við 2,7 mia. krónum.. Fólkið bjargaði bankanum við 2,7 mia. krónum, sum landskassin rindaði, segði formaðurin í Javnaðarflokkinum, sum tá var í andstøðu.

Og legði afturat:

– Tað er í øllum førum eitt sosialpolitiskt tiltak, sum vil nakað. Tá blikna allir skattalættar, segði Jóannes Eidesgaard.

Spurdur, um hetta ikki kundi føra til økta nýtslu, so sum Jørn Astrup Hansen, táverandi forstjóri í Føroya Banka, og Sigurð Poulsen, landsbankastjóri, førdu fram tá, segði Jóannes Eidesgaard, at tað helt hann ikki.

– Tú kans ikki fara inn í ein radiohandil og keypa fyri eitt partabvær. Tað má fyrst umsetast til pening. Eisini forðar skattalógin fyri hesum, tí sambært henni, so verður vinningur av partabrøvum, ið verða seld innan trý ár, skattaður, segði Jóannes Eidesgaard.

Sosialurin royndi fleiri ferðir, áðrenn blaðið fór til prentingar, at fáa viðmerkingar frá løgmanni, men hetta eydnaðist ikki.

# Grein 19 kanning um bank

**Tað hevur ikki trotið við ávaringum, og tí er hetta ikki at vaska hendur, sigur Torbjørn Jacobsen um sítt uppskot um § 19 kanning av søluni av Føroya banka**

EINSKILJING
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í blaðnum dag hevur framsøgumaður Tjóðveldisfloksins í vinnumálum, Torbjørn Jacobsen, drúgva grein, har hann m.a. skjýtur upp at seta eina §19 kanning í verk av søluni av Føroya banka. Hann er ikki samdur við Hermanni Oskarssyni, sum í lesarabrævi sigur, at tað er Løgtingið, sum hevur samtykt leistin, bankin skuldi seljast eftir, og at tað tí er Tingið, sum hevur ábyrgdina av hesum.

Torbjørn Jacobsen minnir á, at Tingið ynskti, at bankin varð seldur fyri so nógv sum gjørligt, og at Tingið ikki hevur ábyrgdina av sjálvari handfaringini av søluni.

- Tað hevur ikki trotið við ávaringum, tá Bárður Nielsen kom við tølunum, sigur Torbjørn Jacobsen, ið sigur bæði seg og Bill Justinussen hava biðið táverandi fíggjarmálaráðharran, Bárð Nielsen, steðga bankasøluni. Harafturat minnir Torbjørn Jacobsen á málningarnar hjá bankanum.

- Her hongur tað, Bárður hevur sagt, og tað sum Mentamálaráðið nú ger, ikki saman, sigur Torbjørn Jacobsen.

### Uppskotið hjá Jenisi er valagn

Tjóðveldistingmaðurin minnir eisini á, at nógv er hent ta seinastu vikuna. Frá einum kursvirði áljóðandi 189, var kursurin seinast Tórbjørn Jacobsen sigur seg hava hugt eftir hesum í gjárkvøldið 253. Tí metir Torbjørn Jacobsen, at ráðgevararnir hava sett kursin ov lágt av fyrstani tíð, og hetta hevur Løgtingið einki við at gera.

- Hví hevur Fíggingargrunnurin valt at selja tveir triðingar